# Heimsins størsta oyggj, men ikki heimsins størsta mál

HELGI ABRAHAMSEN



Grønlendski fólkatingsmaðurin Kuupik Kleist hevði eina grein í Dimmalætting í farnu viku, har hann gjørdi viðmerkingar til tað, sum ein blaðmaður á Dimmalætting skrivaði tann 24. august um ætlanirnar hjá Útnorðurráðnum um undirvísing í grønlendskum og íslendskum í føroyska fólkaskúlanum.

Av tí at undirritaði hevur ført somu sjónarmið fram sum blaðmaðurin, loyvi eg mær at koma við hesum viðmerkingunum.

Kuupik Kleist sigur í greinini, at tað er at yvirmeta samtyktina hjá Útnorðurráðnum, tá ført verður fram, at ráðið vil hava føroysk børn at læra grønlendskt og íslendskt í fólkaskúlanum. Lat okkum vóna at so er. Men sambært tí sum Útvarpið segði frá fundinum í Útnorðurráðnum, so er talan ikki um eina yvirmeting. Útvarpið segði millum annað soleiðis (orðarætt endurgivið):

*"Vit skulu duga betur at skilja og tosa grønlendskt og íslendskt við. Grannamálini skulu á tímatalvuna í fólkaskúlanum í útnorðri, ja útnorðurbúgvar skulu læra meira um viðurskiftini hjá hvørjum øðrum yvirhøvur. Á landsfundinum sum endaði í gjár mælti Útnorðurráðið stjórnini í Íslandi, og landsstýrunum í Føroyum og Grønlandi til, at seta í verk undirvísing í søguni, samfelagsviðurskiftunum, mentanini og málunum hjá hvørjum øðrum. Hetta skal vera fastur táttur í tímatalvuni í fólkaskúlanum, og heitt verður á londini um at gera felags undirvísingartilfar á øllum trimum málum"* (endurgeving endað).

Eg ivist onga løtu í, at tá eitt fak fær pláss á tímatalvuni sum eitt av teimum føstu fakunum, so er tað tekin um, at fakið verður tikið rímiliga seriøst. Og tað at nýtt undirvísingartilfar skal gerast til nevnda fakið, ber boð um, at tað verður raðfest hægri enn nøkur av verandi fakum, har skúlabøkurnar ikki eru endurnýggjaðar í mong ár. Tí vísti eg á í míni grein, at tá økt undirvísing í enskum skuldi á tímatalvuna, so varð beinan vegin tosað um, hvat fak skuldi víkja, fyri at geva pláss fyri hesum, og tá var tað fyri mongum ein sjálvfylgja, at tað skuldi vera danskt, sum mátti víkja. Grundgevingin var, at í stóru verð tosaðu fólk ikki danskt, men enskt. Um íslendskt og grønlendskt nú eisini skulu á tímatalvuna, so havi eg hug at spyrja, um undirvísingin í enskum longu skal minka aftur, ella hevur onkur kanska aftur hesa ferð hugsað um at tað skal ganga út yvir dansktundirvísingina? Og forrestin! hvussu nógv í stóru verð tosa grønlendskt?

**Hvat er endamálið?**

Kuupik Kleist skrivar í greinini seinasta mikudag millum annað: "*Jeg er overbevist om, at både Færøerne, Grønland og Island vil klare sig langt bedre i forhold til globaliseringer, hvis vi øger videns- og erfaringsudvekslingen mellem os og står sammen som region på flest mulige planer*." Hetta sigur hann er ein orsøk til, at "*vi i Vestnordisk Råd arbejder på at ruste ungdommen til globaliseringen ud fra et regionalt perspektiv*".

Til hetta er at siga, at Føroyar og Grønland hava longu frammanundan eitt tætt samstarv á uttanríkispolitiska økinum. Vit hava jú, sum partur av danska ríkinum, felags uttanríkispolitikk við Danmark. Men so vítt eg veit, arbeiðir Kuupik Kleist við hond og fót fyri at loysa okkum úr verandi ríkisrættarligu støðu, og nú vísir tað seg, at sami maður arbeiðir eisini fyri at styrkja samstarvið millum Føroyar, Grønland og Ísland. Hann vil hava Danmark út og Ísland inn. Og her er tað, at ynskið kemur fram, um at vit skulu læra meira um søgu, mál og mentan hjá grønlendingum og íslendingum, samtíðis sum sterkar kreftir virka fyri at troka danskt út úr skúlunum.

Og so kemur tann brennandi spurningurin: Verða vit meira altjóðagjørd saman við Íslandi enn saman við Danmark ?

Tí vísti eg á í míni grein, at við at duga danskt, kunnu vit samskifta við íbúgvarnar í bæði Danmark, Noreg og Svøríki (einar 19 mió. fólk). Hetta eru hóast alt meira enn 50 ferðir so nógv fólk sum tað búgva tilsamans í Íslandi og Grønlandi. Danmark er limur í ES, har tað búgva 480 mió. fólk, meðan Ísland er limur í EFTA, sum telur 3,4 mió. fólk. So her átti at verið lætt at valt, um endamálið er at blíva meira altjóðagjørdur.

# Minni óviðgjørdur fiskur av landinum

BJØRN KALSØ



**Fyri stuttum viðgjørdi Útvarp Føroya orsøkirnar til gongdina, ið vísir at minni av óvirkaðum fiski fer beinleiðis av landinum. Orsøkirnar eru ivaleyst nógvar, og ein av teimum er tann sonevndi Fiskapakkin, ið fór at virka á heysti 2005.**

Hagstova Føroya hevur kunngjørt seinastu tølini, ið lýsa lutfallið av óvirkaðum fiski, sum er landaður beinleiðis uttanlands.

Niðurstøðan er greið: Nøgdin av óvirkaðum fiski er minkað seinasta tíðarskeiðið, samanborðið við sama tíðarskeið í fjør. Í Útvarpinum metir stjórin á Hagstovu Føroya, at orsøkin er at finna í hækkandi oljuprísum. Tískil er avleiðingin hon, at siglingin niður á marknaðin er vorðin ov kostnaðarmikil.

Meting Hagstovunnar er ikki skeiv, men eg vil minna á, at aðrar orsøkir eisini hava bygt upp undir hesa góðu gongd.

Politiskt eru beinleiðis stig tikin hesum viðvíkjandi. Hugsað verður um sonevnda Fiskapakkan, sum varð samtyktur – og fór at virka – á heysti í 2005.

Uttan at fara í smálutir kann nevnast, at Fiskapakkin umfatar:

Lógarbroytingar í lógini um vinnuligan fiskiskap.

Nýggja kunngerð um treytir fyri avreiðing í Føroyum og uttanlands.

Broytingar í reglugerð um Fiskamarknað Føroya.

Broytingar í kunngerð um almenna uppboðssølu.

Nevndu stig hava viðført:
at føroyingar og útlendingar kunna bjóða javnsíðis uppá føroyskan fisk heima í Føroyum.
at skip uttanfyri fiskidagaskipanina eru áløgd at avreiða í minsta lagi 75% av veiðuni í Føroyum. Hetta var frammanundan bert galdandi fyri skip í fiskidagaskipanini.

Harumframt eru reglur gjørdar, og settar í verk, ið hava til endamáls at koma so nevndu "proformahandlunum" til lívs.

Mín niðurstøða er tí, at júst hetta stigið við "Fiskapakkanum", er ein av høvuðsorsøkunum til, at minni fiskur nú verður landaður uttanlands.

Fiskapakkin er eitt úrslit av tí arbeiði, Fiskimálaráðið tók stig til, og sum seinni varð skipað í samstarvi við politisku skipanina annars, og ikki minst vinnuna sjálva.

Illur???

Sig tína meining í Sosialinum




# Mjólkneyt mugu víkja fyri gravkúm

BEATE L. SAMUELSEN,
býráðslimur í Havn



Í býráðnum í Havn verður landbúnaðurin ikki virdur. Við eini samtykt á býráðsfundinum hóskvøldið skal ítróttarhøll byggjast á dyrkaðum lendi á Argjum. Bóndin má við sínum mjólkineytum víkja fyri gravkúgvum

Á Argjum búgva nú so nógv fólk, at har skal byggjast ein ítróttarhøll. Alt gott um tað. Eina ítróttarhøll skulu tey sjálvandi hava, men tað átti at borið til at funnið eitt annað hóskandi lendi har úti til hesa bygging enn júst dyrkaða lendið, sum bóndin hevur velt til bø sum fóður til síni mjólkineyt.

Skal umrødda lendið brúkast til at byggja ítróttarhøll á, krevur verandi byggisamtykt eina broyting. Tað var henda broyting av galdandi samtykt, Tórshavnar býráð á fundinum hóskvøldið samtykti at fremja.

Við 12 atkvøðum fyri og einari ímóti, nevniliga atkvøðuna hjá undirritaða, samtykt býráðið at broyta samtyktina, og við hesum koma gravkýr at mynda bøin í staðin fyri livandi kýr.

Tá sama mál var fyri í býráðnum í vár, var tað einmælt samtykt. Eisini eg tók undir við tí tá, við tí sjálvfylgju, at bóndin sjálvandi var kunnaður um tað, sum henda skuldi.

Men tað var hann ikki, vísir tað seg nú. Og tí kann eg ikki taka undir við bygging av ítróttarhøllini á dyrkaða bøin.

Í brævi sent býráðslimum tíðliga í summar, greiddi bóndin okkum frá, at hann fyrst frætti um ætlanina hjá býráðnum at taka velta bøin frá honum í fjølmiðlunum. Eingin hevði kunnað hann um ætlanina. Hann noyddist sjálvur biða um fund við umsitingina og teir býráðslimir, sum hava arbeitt við málinum.

At hann mótmælti, skilji eg væl.

**Føðigrundarlagið burtur**

Talan er um dyrkilendi, sum hoyrir til festið hjá bóndanum. Sambært løgtingslóg um landsjørð frá 17. mai 2004 stendur í grein 10, at øki, ið Búnaðarstovan selur av landsjørð at byggja á, skal fyrst og fremst umfata ódyrkaða jørð.

Umrødda dyrkaða lendið er partur av bøi, sum er grundarlagið fyri, at at bóndin kann hava mjólkineyt. Skulu vit her í landinum hava nakran sum helst møguleika at geva børnum okkara góða, fríska føroyska mjólk, so kann hetta ikki gerast, tá vit taka føðigrundarlagið undan mjólkineytunum.

Og tað er júst tað, sum Tórshavnar býráð gjørdi við broytingini av samtyktini hóskvøldið í farnu viku. Hetta er ein liður í samlaðu almennu byggiætlanini hjá Tórshavnar kommunu. Tað vita vit, men ein ítróttarhøll á Argjum kann saktans byggjast onkra aðra staðni á Argjum enn beint á einum uppdyrkaðum lendi.

Eitt kolossalt arbeiði er lagt í umrødda lendið, sum núverandi bóndin og pápi hansara, sum eisini var bóndi, hava lagt í jørðina, sum teir hava drenað og bøtt um síðani 1980, so at bøurin er góður í dag.

Havnin er ikki tann parturin av Føroyum, sum er mest kent fyri jarðarbrúk ella neytahald.

Seinni árini hevur nógv verið gjørt fyri at menna mjólkaframleiðsluna í Føroyum og samstundis minka um innflutningin av útlendskari mjólk. Hetta hevur fyri ein part eydnast.

**Lógin skúgvað til viks**

Tá vit í Tórshavnar býráð leggja á veltað bøin, skerja vit møguleikarnar hjá bóndum at hava mjólkineyt og harvið minka vit um føroyska mjólkaframleiðslu og økja aftur um innflutningin av útlendskari mjólk.

Tað er ikki eitt serliga jaligt tekin at geva smærru kommununum, sum lagt hava saman við okkum seinnu árini.

Kúgvin, vit mest kenna til her, man vera gravkúgvin. Tað sær út til, at vit her í býráðnum hava so lítla virðing fyri tí sindri av jarðarbrúki sum eftir er í kommununi, at lendi skal ofrast til frama fyra eina ítróttarhøll.

Eg havi einki ímóti eini ítróttarhøll. Sjálvandi skulu Argir, sum er vaksin til ein stóran og fólkaríkan bý í býnum, hava eina ítróttarhøll, sum er hóskandi til tann aktivitet, sum okkara ungfólk íðka og venja í dag. Ongantíð ov skjótt. Men at høllin skal byggjast á dyrkaðum lendi, sum verður brúkt til mjólkaframleiðslu, tað havi eg nógv ímóti.

Tað mátti verði eitt minstakrav, at býráðið og byggi- og býarskipanarnevndin kunnaðu bóndan á staðnum um ætlanina um at ognartaka stóran part av uppdyrkaðu jørðini.

Við byggingini av eini ítróttarhøll á dyrkaða jørð, ganga vit beint ímóti eini galdandi løgtingslóg.